Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um læraraútbúgvingina og lærarayrkið, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at øll lesandi, sum útbúgva seg til lærara, skulu fáa betri innlit í serøkið og kunnleika til næmingar við serligum avbjóðingum?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at nýútbúnir lærarar fáa hollari innlæring í, hvussu ein skipar undirvísingina fyri næmingar, ið hava serligar avbjóðingar?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at fólkaskúlin fær nóg høga normering til, at lærarar fáa tíð og orku til eisini at undirvísa næmingum við serligum avbjóðingum?
4. Tekur landsstýrismaðurin fakkunnleikan innan føroyska fólkaskúlan við í endurskoðanina av læraraskúlaútbúgvingini?

Viðmerkingar:
Í svari til § 52 a fyrispurning frá undirritaða í fjør, vísti landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum á, at hann ætlar at endurskoða læraraútbúgvingina í 2021.

At vera lærari í dag setir ikki bara krøv til fjøltáttaða undirvísing, men eisini til ítøkiligar undirvísingartilgongdir til næmingar við ymiskum avbjóðingum so sum næmingar við diagnosum. Fólkaskúlalógin leggur upp til, at undirvísingin skal vera lagað til einstaka næmingin og læring hansara. Og kanningar vísa, at uml. 25% av ungdóminum í dag líða av strongd, angist og tunglyndi, har m.a. skúlanoktan er ein fylgja. Av hesum 25% er aftur ein fjórðingur, sum er heilt illa fyri og krevur eina serliga skúlafyriskipan. Tí er umráðandi at vita, um læraraútbúgvingin og karmarnir gera tað møguligt hjá lærarum at lofta øllum næmingum í dag.

Sjálvt um førleikastovurnar í skúlunum eru upprøðfestar, og hóast myndugleikarnir hava staðsett fleiri serskúlatilboð til at hjálpa næmingum við serligum avbjóðingum, so eru tað fleiri og fleiri næmingar í vanliga skúlanum, sum hava ymsar avbjóðingar í skúladegnum. Hesir næmingar krevja tað av læraranum, at hann hevur innlit í avbjóðingarnar hjá teimum og kann leggja undirvísingina til rættis eftir tørvinum hjá teimum. Hetta kann vera sera krevjandi fyri læraran, og skal hann tí búgvast væl til uppgávuna, ið møtir honum innan skúlans gátt. Í sama viðfangi er eisini týdningarmikið at seta sær spurningin, um normeringin í fólkaskúlanum er nøktandi - ein lærari til 26 næmingar.

Læraraskúlin hevur tí eina stóra ábyrgd av at fyrireika komandi lærarar til skúlalívið. Undirvísingarfortreytirnar broytast støðugt og samfelagið broytist støðugt. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 11. januar 2021

Jóhannis Joensen